# Brotsverk móti børnum verða harðari revsað

ANNIKA OLSEN

landsstýriskvinna í innlendismálum



Nógv umrødda revsilógin við heili 52 broytingum, ið just er samtykt á tingi, gevur okkara smæstu borgarum í landinum, nevniliga børnunum eina mundandi betri rættartrygd. Brotsverk sum eitt nú siðamisbrot verða eftir nýggju dagførdu revsilógini munandi harðari revsað. Sum á mongum økjum hevur okkara revsilóg verið afturúrsigld í mun til okkara grannalond, og meginparturin av revsilógini stavar frá fornari tíð, og er als ikki í samsvari við nútíðina.

**Barnapornografi ein stórur trupulleiki**

Í kjalarvørrinum á einari og hvørjari samfelagsmenning fylgja eisini trupulleikar av sera grovum og kriminellum slag. Sjálvt um vit fegnast um menningina av eitt nú alnótini, so mugu vit samstundis ásanna, at alnótin eisini hevur eina álvarsliga rangmynd, ið er, at tað er vorðið munandi lættari at fáa fatur á barnapornografiskum myndum og at útbreiða hesarmyndir. Barnapornografi er vorðin ein sera stórur trupulleiki, og eiga vit at gera tað, vit megna fyri at fáa tamarhald á hesum støðugt vaksandi trupulleika. Júst samtykta revsilóg er eitt stig tann rætta vegin við at herða revsingina í § 235, soleiðis at persónar, sum býta ónærisligar myndir, filmar ella aðrar visuellar endurtøkur av personum undir 18 ár, kunnu revsast við bót ella fongsul í upp til 6 ár, um talan er um herðandi umstøður. Herðandi umstøður er m.a., um barnið verður útsett fyri vanda, har valdsnýtsla er ínni í myndini, at barnið verður álvarsliga skatt, ella um talan er um serliga systematiska útbreiðslu av barnapornografiskum tilfari.

Harumframt er ein herðing av revsingini, um man hevur barnapornografiskar myndir í varðveitslu av persónum undir 18 ár. Revsingin fer úr ½ ári til 1 ára fongsulsrevsing.

Eg meti tað vera alneyðugt at herða nettupp hesar brotsgerðir, tí talan er um børn, ið verða útsett, misbrúkt á grovasta hátt, og tískil vísir herðingin av hesi lógargrein, at vit ikki góðtaka tílíkan kriminalitet í Føroyum. Sjálvsagt er tað ikki nokk at skrúva revsirammuna upp og halda, at nú steðga øll brotsverk av tílíkum slag, nei tað er somuleiðis neyðugt at styrkja um eftirkannan og eftirlitið av fólkum, ið eru við til at útbreiða barnapornografisk tilfar, og fólkum, ið hava tílíkt tilfar í varðveitslu.

Somuleiðis er tað eisini neyðugt at upplýsa brúkaran um filturskipanir, ið gera tað truplari at koma framat heimasíðum á netinum, ið innihalda ónærisligar myndir av børnum.

**Brotsverk móti børnum skulu fordømast**

Eitt tað størsta brotsverkið, man kann útseta eitt barn fyri, er incest ella siðamisbrot. Hetta er harðskapur og valdsnýtsla av grovasta slag, sum skal steðgast ongantíð ov skjótt. Vit hava alt ov nógv børn og ung í Føroyum, ið dagliga líða og hava ilt í sálini orsakað av hesum ræðuliga harðskapi. Hesi børnini kenna seg í mongum lutum einsamøll og svikin, og tað minsta, vit politikarir kunnu gera er at herða revsingina fyri hesi brotsverk og harvið greitt vísa, at hetta eru brotsverk, ið vit als ikki kunnu góðtaka.

Samtykta revsilógin herðir nevniliga revsingina fyri siðamisbrot, har revsiramman fer úr 6 árum upp í 8 ár, og undir herðandi umstøðum fer revsiramman úr 10 árum uppí 12 ár. Tað verður millum annað sæð sum ein herðandi umstøða, um persónurin hevur gjørt sær dælt av, at hann/hon hevur fingið samlegu við barn/børn orsakað av sínari psykiskari og fysiskari styrki.

Tað er sera torført at koma hesum harðskapi til lívs, og tískil er tað neyðugt við støðugari upplýsing. Vit eiga at stuðla felagsskapum, ið gera eitt megnararbeiði fyri at hjálpa hesum børnum. Siðamisbrot er onki minnið enn brotsverk móti børnum, og tískil skal hetta ikki tigast burtur í okkara samfelag, men vit skulu kunna tola at tosa opið og hart um tílík mál, tað veri seg í fólkaskúlanum, miðnámsskúlanum og har hvørt annars býðst fyri harvið at hjálpa børnum, ið eru offur fyri tað mest mannminkandi, man kann útseta eitt menniskja fyri.

# UNIKLAX - Vitanardepil Norðoya

KÁRI Á RÓGVI

løgtingsmaður



**Størsta einstaka arbeiðspláss á Norðlandinum í Íslandi er UNAK – Háskóli Akureyrar. Í hesum tíðum hevði verið kærkomið at havt UNIKLAX – depil við vitan og arbeiðsplássum**

Í kvøld verður skipað fyri fundi fyri "løgtingslimir, sum eru uppstillaðir í Norðuroyggjum." Tíverri havi eg onga innbjóðing fingið, hóast eg fekk týðandi part av atkvøðum mínum í Norðoyggjum, eri sjálvstýristingmaður við flestu atkvøðum í Norðoyggjum, stillaði upp á sama lista norðoyingar og havi áhaldandi samband við partamenn og veljarar har norði. Hetta er harmiligt av tvinnanda orsøkum. Tann fyrra er, at tann bólkurin, ið samskipað vil virka fyri betraðum korum fyri Norðoyggjar verður minni og stendur veikari á tingi. Tann seinna er, at orðaskiftið verður verri, tí ongin er at smæla ímóti tí vanliga og lata onnur ískoyti út í kjakið.

**Vitanardepil**

Undir orðaskiftinum um sonevndu tunnlarnar Norð um Fjall fanst eg at teimum, ið hava verið valdir við atkvøðum úr Norðoyggjum, tí Norðoyggjar sakka bert longur og longur afturút við teirra politikki.

Í fjør samtyktu vit á løgtingi at gera skúladepil í Tórshavn, nú at gera tunnlar Norð um Fjall; tað næsta verður universitet í Tórshavn og tunnil til Viðareiðis. Mynstrið er greitt: miðøkið raðfestir íløgur í vitan, sum geva nógv arbeiðspláss, bæði í gerð og eftir, festa ungdómin og skapa grundarlag fyri nýggjum vinnum – afturímóti raðfestur norðurøkið flutningskervið, ið tíverri ikki gevur stórvegis arbeiðspláss, men bert lættir um ferðina suður í meginøkið. At klaksvíkingur nr. 5.000 var tilnevndur fyri fjórðingsøld síðani, men fólkatalið síðani er fallið, sigur eisini alt um úrslitið av raðfestingunum hjá løgtings- og kommunalpolitikarum, "sum eru uppstillaðir í Norðuroyggjum."

Hevði Sjálvstýri rátt fyri borgum, so broyttu vit tunnilslógina til "lóg um vitanardepil í Norðoyggjum." Vit bygdu depil at húsa sjóvinnuútbúgvingum (skulu navigatørar ferðast um alla verðina, kunnu teir eisini taka bussin til Klaksvíkar undir lesnaði), vit stovnaðu útbúgvingar innan útgerðarvinnu, matvørufrøði og alskyns eftirútbúgvingar fyri sjófólk.

Hetta síðsta átti at verið av allar størstu vinnum í Føroyum. Mangir av okkara allar frægastu monnum ferðast fleiri ferðir árliga í onnur lond í oljuvinnu, at fiska rækjur í Grønlandi, seta línu í Noregi ella føra donsk farmaskip um stórhøvini. Hesir mugu brúka alsamt stórri part av frítúrunum at ganga á skeið – oftast uttanlands. Gjørdu vit eftir mínum ráðum, so kundu vit veitt øll neyðug skeið í Føroyum; mong arbeiðspláss og stór inntøka stóðst av hesum; menn høvdu verið meira heima, og fóru teir á skeið, kundu teir ferðast til hús um kvøldið ella kanska tikið familjuna við til Klaksvíkar og ferðast í frálíka umhvørvinum har í nakrar dagar.

**Norðoyastevna**

Orðið "stevna" merkir bæði samkoma og ætlan. Okkum tørvar at orða nýggja 'Norðoyastevnu' ið miðvíst veitir hesum øki framburð. Havnaløg og asfalt mugu bíða nakað, tí samferðslukervið bøtir um vælferð, men tíverri ikki stórvegis um vinnu. Afturfyri liggja risastórir møguleikar í vitanarkervinum.

Løgnast er, at skúlaskapur í nýggjari tíð byrjaði í Norðoyggjum – í Klaksvík og í Føgrulíð, men fær nú so ringar sømdir frá teimum, "sum eru uppstillaðir í Norðuroyggjum."

Nú má stundin vera komin at flyta skúlaskap norð aftur í føðistað føroyskra framburðar. Stovni vit tí UNIKLAX.

# Øll sum vilja javnstøðu atkvøða »ja« sunnudagin

EDMUND JOENSEN

løgtings- og fólkatingsmaður



**Javnstøða millum kynini er á dagsskrá, tá fólkaatkvøða verður um trúnuarvalógina sunnudagin**

Kanska er freistandi er at sita heima, tá fólkaatkvøða verður um trúnuarvalógina sunnudagin 7. juni.

Fleiri hugsa kanska, at spurningurin, ið er til atkvøðugreiðslu, er ikki nóg viðkomandi fyri okkum í Føroyum.

Lat okkum líka venda hesum og spyrja, hvat fólkaatkvøðan snýr seg um?

Jú, ítøkiliga snýr hon seg um at broyta trúnuarvalógina, so kynini verða javnsett í arvarøðini.

Tað merkir, at um úrslitið á fólkaatkvøðuni verður eitt "ja", so er í framtíðini líka mikið, um fyrst fødda barnið hjá kongi ella drotning (regentinum) er genta ella drongur – viðkomandi arvar trúnuna uttan atlit til kyn.

Í grundini er hetta ein rættiliga prinsippiellur og viðkomandi spurningur fyri okkum øll. Taka vit undir við javnstøðu millum kynini? Ella eru vit ímóti javnstøðu?

Tey, sum eru fyri javnstøðu, hava møguleikan at senda eitt greitt signal um tað á fólkaatkvøðuni sunnudagin.

Til endans er møguleikin at fara á val jú ein demokratiskur rættur, ið allir føroyingar hava. Tann rættin eiga vit altíð at brúka og at verja.

Min áheitan er: Farið fjøllment á val. Valið snýr seg um javnrættindi og fólkaræði.

# Nationali stoltleikin gloymir tey gomlu, sjúku og veiku

HJØRMUND OLSEN

Húsavík

**Tað er nógv fyri at hugsa sær, at loysingarsinnaðir politikarar vilja lata tey gomlu, sjúku og veiku liggja uttan hjálp, tí teir av nationalum stoltleika ikki vilja prístalsregulera blokkstuðulin**

Statsministarin sigur seg vera sinnaðan at tosa um blokkin, men føroyskir loysingarmenn siga nei. Samtíðis rópa øll eftir meira pengum, men har eru eingir pengar. Og nú skal uppaftur meira sparast, tí undirskotið nærkast milliardini.

Hjálpin til gomul, sjúk og veik verður spard burtur orsaka av nationalum stoltleika.

Um tey loysingarsinnaðu meintu nakað sum helst við loysingina, so lótu tey nøkur og tjúgu prosent av lønini til landskassan (afturat vanliga skattinum). Tað er tað sum loysingin í minsta lagið kostar, um vælferðin skal vera sum hon er nú. Men tað vilja tey ikki. Tey vilja hava onnur at gjalda við eini verri tænastu.

Tað nyttar ikki at biðja Rósu Samuelsen koma við fleiri pengum, tí har eru eingir pengar. Farast má til sjálva rótina í málinum, og hon er, at somu politikararnir, sum ikki eiga pengar at játta, siga nei til at fáa pengar aðrastaðni frá.

At tosa um ein undirsjóvartunnil til Sandoynna, og um loysing, er sum at blása við mjøli í munninum, tí verður eingin blokkstuðul, so verður heldur eingin tunnil, tí pengar mangla allastaðni.

Nationali stoltleikin forðar eisini fyri tí.

Og nú skulu vit hava fólkaatkvøðu um trúnarvingalógina. Hví sigur Javnstøðunevndin einki? Er tað líkamikið fyri hana, um javnstøða er á tí økinum ella ikki? Ella er hetta aftur tann nationali stoltleikin, sum ger at tey ikki tora at siga nakað?

Eru føroyingar ov stoltir at hjálpa teimum, sum treingja til hjálp og eisini ov stoltir til at hava eina meining um trúnarvingalógina?